Stjørnuskotið, Brandur Enni:

# Undirhald, poppur og Grand Prix

**Norðurlandahúsið var fullsett tá fyrsta konsertin við nýggja føroyska stjørnuskotinum, Brandur Enni, fór av bakkastokki klokkan 16 fríggjadagin. Fyrsta konsertin var fyri innbodnum, men so stórur áhugi var fyri almennu konsertini, at fyrireikararnir valdu at hava eina eykakonsert seinni um kvøldið**

KONSERT
*Orð: Ingrid Bjarnastein*

*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Brandur Enni helt fríggjadagin tríggjar fullsettar konsertir í Norðurlandahúsinum*

Norðulandahúsið var stúvstappað við innbodnum gestum til fyrstu konsertina við Branduri Enni. Millum gestirnar vóru politikkarar, fjølmiðlafólk, floksfelagar, tónleikarar, stuðlar og onnur, sum á ein ella annan hátt eru knýtt at útgávuni hjá Branduri. Og at ongin minni enn Pætur við Keldu varð valdur sum upphitari, gjørdi ikki annað enn at borga fyri góðsku. Og sum sagt varð í Norðurlandahúsinum, so er hetta fyrstu ferð føroyingar kundu síggja Pætur á palli síðani nógv umtalaðu luttøkuna í danska Grand Prixnum.

## Grand Prix dámur

Tað hoyrdist á klappunum hjá fjøldini, at Pætur er ikki bara ein og hvør. Tá hann kom á pallin, rungaðu lógvabrestirnir í salinum. Í fyrsta umfarið var Pætur einsamallur. Hann byrjaði við at spæla stilla sangin, Gakk tú tryggur, og síðani spældi hann Over the Rainbow. Ein góð byrjan.

Tá Pætur hevði spælt nakrar sangir, komu Jan Zachariassen og Eyðun Nolsøe eisini á pallin. Saman spældu teir løg millum annað eitt lag hjá Paul McCartney, Junk og eitt lag av fløguni, sum Norðoya Sparikassi gav út.

Eyðun og Jan fóru síðani aftur av pallinum, og inn trein Tóra við Keldu. Ongin ivi var um, hvat lag nú var á skránni. Som en drøm kom eisini til sín rætt á konsertini. So tað var ikki uttan grund, at Pætur og Tóra vórðu fylgd av lógvabrestum, tá tey fóru av pallinum.

## Ósmæðin

Nógvir av Føroya bestu tónleikarum eru við á fløguni, Waiting in the Moonlight, hjá Branduri. Talan er millum annað um Eyðun Nolsøe, Kim Hansen, James Olsen, systrarnar Arnfríð og Rannvá Lützen, Karl Martin Samuelsen og Niclas Johannesen. Og kórið mannaðu eisini Eyðun, Kim, James, Arnfríð og Rannvá. Síðani trein Brandur á pallin. Hann var ósmæðin og smæddist ikki við at dansa og hoppa, sum ein onnur poppstjørna. Við sær hevði hann dansarar, sum góvu showinum eitt eyka pift uppeftir.

At unglingin dugdi tað hann skuldi var ongin ivi um. Hann hevur eina reina og klára rødd, og hann var allatíðina miðpunktið í framførsluni. Tað einasta, ið kanska var at fílast á var ljósið. Ljósuppsetingin var eitt sindur keðilig. Fyri tað fyrsta, so var pallurin heldur myrkur, og tað gjørdi, at um tú sat langt burturfrá, so sást tú ikki so væl. Eisini tá "spot-ligth" var brúkt, so kundi tað til tíðir tykjast sum um Brandur gjørdi alt fyri ikki at standa í "spot-light". Høvdið ella eitt sindur av kroppinum var mestsum allatíðina uttanfyri, og kundi hetta ikki vera sørt ørkymlandi. Á gólvinum stóðu stórir ljóskastarar, sum lýstu beint á áskoðarafjøldina, og tá teir fóru at blunka kundu teir mestsum blenda áskoðararnar, og ein kann siga, at hetta var ikki nakað serliga behagiligt. Men hesum undantikið, so varð tiltakið uttan iva ein brakandi succes.

Stjørnuskotið framførdi nakrar enskar sangir, og eini tveir føroyskar. Alt í alt var konsertin um ein góðan tíma til longdar.

## Sjónbandalag

Sum rosinan í pylsuendanum fekk áskoðarafjøldin eisini høvi at síggja nýggja sjónbandalagið, sum er gjørt til eitt av løgunum, Waiting in the Moonlight, sum eisini er heitið á fløguni. Tað er Media Music í Keypmannahavn, sum hevur gjørt sjónbandalagið, sum er upptikið í Føroyum. Talan er um eina rættiliga professionella samanseting við eini lítlari søgugongd, har Brandur er "hetjan".

Tá konsertin var liðug fingu teir Brandur og nakrir av luttakarunum, samskiparin, Steintór Rasmussen og nøkur av hjálparfólkunum handað blómutyssi og rósur. Allir floksfelagarnir hjá Branduri komu upp á pallin við eini rósu í part. At enda hevði pápabeiggi Brandur, Birgir Enni skipað fyri, at øll fingu okkurt leskiligt. Borðreitt var við øðum og rækjum í einum rúmi í Norðurlandahúsinum.

Eitt væleydnað tiltak við fjølbroyttum, melidiøsum popptónleiki, sum fellur lætt í oyrað.

*Brandur syngur av lívsins kreftrum*



*Emil Juul Thomsen úr Bókagarðinum er 85 ára gamal, og eisini hann vildi hava autograf frá 12 ára gamla stjørnuskotinum*



*Dansararnir settu sín serliga dám á konsertina*



*Eisini Pætur við Keldu hevði úr at gera við at skriva autografar*





# Brandur og elitan

**Brandur Enni hevur nógvar av fremstu tónleikarum í Føroyum í rygginum, nú nógv verður lagt fyri í royndini at selja fløgur uttanlands**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Nógv av teimum fólkunum, sum hava verið við í arbeiðnum við nýggju fløguni hjá Brandi Enni, vóru til staðar, tá tónleikurin av fløguni varð avdúkaður í Norðurlandahúsinum fríggjadagin.

Á pallinum og á fløguni er tað Brandur Enni, sum stjørnan, men handan leiktjøldini hava nógvir av fremstu føroysku tónleikarunum arbeitt miðvíst fyri at fáa tónleikin á altjóða stig.

Niclas Johannesen, Óli Poulsen, Eyðfinn Jensen, Kim Hansen, In-G, Johannus á Rógvu Joensen, Lenhert Kjelsen og høvuðsmaðurin í ætlanini Steintór Rasmussen vóru millum fólkini, sum lurtaðu við spentum oyrum, tá Brandur Enni fór á pallin fyri fyrstu ferð við nýggja tónleikinum.

Summir av teimum vóru eisini á pallinum eina løtu saman við Brandi, og tá fløgan nú fer at verða spæld í føroyskum og kanska útlendskum fløguspælarum, eru tað millum annað hesi fólkini, sum hava skrivað, spælt, sungið, framleitt og ljóðblandað tónleikin.

## Umfatandi samstarv

Fólkini, sum hava gjørt tónleikin á fløguni hjá Brandi Enni, teljast millum tey evnaríkastu føroysku, tá tað snýr seg um popptónleik, og fleiri teirra hava fingið smærri og størri gjøgnumbrot uttanlands.

Óli Poulsen er virdur framleiðari í Danmark, Niclas Johannesen hevur gjørt framstig í Kanada, Eyðfinn Jensen og Kári Jacobsen fáast burtur av við tónleik og upptøkur í Danmark og Lenhert Kjeldsen er ein tann mest nýtt mastrarin í Danmark.

Tí er sannlíkið fyri, at nakað gott og professionelt kemur burturúr, tá hesi taka saman hendur við teimum dugnaligastu í Føroyum, stórt. Hetta hoyrst eisini á tónleikinum á fløguni, sum ljóðar eins væl og tann moderni popptónleikurin, sum er frammi í tíðini.

Miðdepilin í øllum, tá tað snýr seg um framførslur og image, er 12 ára gamli Brandur Enni, og hann er eisini úr slíkum tilfari, sum stjørnur eru gjørdar av.



*Brandur Enni millum nakrar av teimum, sum hava verið við í arbeiðnum við nýggju fløguni. Mynd: Jens Kristian Vang*

Hann hevur evni at syngja, hann torir og dugir at føra seg fram, og hann er væl dámdur millum fólk í øllum aldri.

Tað kann væl verða at Brandur og hini, sum hava gjørt Waiting in the Moonlight, eru í eini bíðistøðu, men sjáldan áður – um nakrantíð – er so nógv lagt fyri í eini roynd at fáa føroyskan popptónleik fram uttanlands.

Karl Martin Samuelsen:

# Trúgv upp á tað, Brandur!

**– Tað er gott at hava dreymar, at seta sær mál og arbeiða fram ímóti teimum, heldur ein av royndu sangarunum í landinum, Karl Martin Samuelsen**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*



*12 ára gamli Brandur Enni var fríggjadagin miðpunktið á trimum konsertum, sum vóru hildnar í Norðurlandahúsinum.*
*Mynd: Jens Chr. Vang*

Karl Martin Samuelsen byrjaði sum Brandur Enni at framføra tónleik fyri fólki sum 12 ára gamal. Men tað var á einum øðrum stigi enn nýggja stjørnuskotið.

Pallurin var ikki Norðurlandahúsið, men onkur kjallari í Klaksvík, og endamálið var ikki at vinna fram í útlondum, men at savna pengar til eitt trummusett, sum kostaði hundrað krónur.

Men dreymarnir, málini og orkan, sum varð løgd í arbeiðið, var tann sama, sum Brandur Enni leggur í sín tónleik.

– Tað er gott at hava dreymar, at seta sær mál og arbeiða fram ímóti teimum. Tað skal Brandur sjálvsagt gera, og hann skal trúgva upp á seg sjálvan, sigur Karl Martin Samuelsen, sum var til konsert við stjørnuskotinum fríggjadagin.

## Seta sær smá mál

Karl Martin Samuelsen heldur, at framførslan fríggjadagin var merkt av, at tað var fyrsta konsertin av slíkum slagi, og at Brandur ikki hevur so nógvar royndir.

– Men Brandur hevur eitt risastórt potentiali. Hann er ein sjarmerandi og fittur drongur, hann dugir væl at syngja, og hann hevur dirvið og viljan til at fáa nakað burturúr. Skal tú koma nakran vegin, so er tað sera umráðandi, at tú ikki bara hevur evnini, men eisini viljan, og tað hevur Brandur, heldur Karl Martin Samuelsen.

Hann hevur sjálvur verið sera íðin tónleikari, síðani hann var ungur drongur. Hann hevur spælt í einum av best umtóktu bólkunum í landinum, Hjarnar, og teir vóru um reppið at fáa gjøgnumbrot uttanlands fyrst í áttatiárunum.

– Sum tónleikari skalt tú at byrja við seta tær nøkur smá og realistisk mál, sum tú so arbeiðir fyri at náa. Serliga í tí aldrinum, sum Brandur er í, er tað umráðandi, at tú merkir, at tað gongur framá. Tú skal gera framstig, náa nøkrum málum og seta tær nýggj, sigur Karl Martin Samuelsen.